# Akademiútbúgvingin
# Miðnám á Kambsdali

MIÐNÁM Á KAMBSDALI
KAMBSDAL COLLEGE

**Í lestrarhálvuni várið 2022 verða, um nóg nógv tekna seg, hesar lærugreinar bodnar út:**

### Broytingarleiðsla

- **Vallærugrein** til leiðslubreytina
- **Týsdagur,** byrjar fyrst í septembur
- **Seinasta freist** at tekna seg er mánadagin, 17. januar 2022
- **Kostnaður** er 4.800,00 kr.

### Búskaparstýring í verki

- **Kravd lærugrein** til búskapar- og tilfeingisbreytina
- **Týsdagur,** byrjar fyrst í februar
- **Seinasta freist** at tekna seg er mánadagin, 17. januar 2022
- **Kostnaður** er 4.800,00 kr.

### Marknaðarstrategi og virkismenning

- **Kravd lærugrein** til sølu og marknaðarførslubreytina
- **Týsdagur,** byrjar fyrst í februar
- **Seinasta freist** at tekna seg er mánadagin, 17. januar 2022
- **Kostnaður** er 4.800,00 kr.

***Eisini ber til at skriva endaliga verkætlan á AÚ, Miðnám á Kambsdali. Kostnaðurin er 6.300,00 kr.***

Tilber at melda seg til á heimasíðu skúlans: **www.kambsdalur.fo**

## Akademiútbúgvingin á Miðnámi á Kambsdali

**Lestrartíð: 3 ár**
**ECTS: 60**
**Upptøka: Hvørja lestrarhálvu**

Akademiútbúgvingin – stytt AÚ – er parttíðar útbúgving til tín, sum hevur starv og ynskir eina framhaldandi útbúgving. Útbúgvingin gevur tær møguleika at førleikamenna teg í verandi ella komandi starvi.

Akademiútbúgvingin er sera liðilig, og tað ber til at taka stakar lærugreinar ella eina samlaða útbúgving, ið fevnir um fimm lærugreinar og eina endaliga verkætlan.

Vit bjóða tær akademiútbúgving innan tríggjar ymiskar breytir:

**Søla og marknaðarførsla**: er til tín, ið starvast ella ynskir at starvast innan sølu og marknaðarførslu. Útbúgvingin gevur tær innlit í, hvat hendir á marknaðinum, og hvussu tú kanst seta ferð á eftirspurningin eftir vørum og tænastum bæði á heimamarknaðinum og á altjóða marknaðinum. Kravdar lærugreinar eru: Marknaðarkunning og -greining, Marknaðarætlan og -samráðingar og marknaðarkunning og -greining. Harafturat eru tvær vallærugreinar og endalig verkætlan. Vallærugreinirnar skulu vera innan merkantila fakøki.

| MARKNAÐARSTRATEGI OG VIRKISMENNING | MARKNAÐARKUNNING OG GREINING | MARKNAÐARÆTLAN OG -SAMRÁÐING | VALLÆRUGREIN | VALLÆRUGREIN | ENDALIG VERKÆTLAN |
|---|---|---|---|---|---|
| 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS |

**Búskapur og tilfeingi:** er til tín, ið starvast ella ynskir at starvast innan búskap og logistikk. Útbúgvingin gevur tær innlit í búskapin í virkinum, og hvussu tilfeingið í virkinum kann lagast til virksemið. Kravdar lærugreinar eru: Vinnubúskapur og Búskaparstýring í verki. Harafturat eru tríggjar vallærugreinar og endalig verkætlan. Minst tvær av vallærugreinunum skulu vera innan merkantila økið, og í mesta lagi ein lærugrein frá øðrum fakøki.

| VINNUBÚSKAPUR | BÚSKAPARSTÝRING Í VERKI | VALLÆRUGREIN | VALLÆRUGREIN | VALLÆRUGREIN | ENDALIG VERKÆTLAN |
|---|---|---|---|---|---|
| 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS |

**Leiðsla:** er til verandi og komandi leiðarar og fevnir m.a. um starvsfólkaleiðslu, verkætlanarleiðslu, toymisleiðslu og broytingarleiðslu. Útbúgvingin er fyri teg, ið hevur áhuga í at fáa leiðsluamboð og innlit í leiðslu, samstarv og samskifti. Kravdar lærugreinar eru: Fyriskipan og starvssálarfrøði, Leiðsla í verki og Strategiskur

leiðaraskapur. Harafturat eru tvær vallærugreinar og endalig verkætlan. Onnur av vallærugreinunum skal vera innan breytina, meðan hin vallærugreinin kann veljast millum allar lærugreinar innan merkantila økið.

| LEIÐSLA Í VERKI | FYRISKIPAN OG STARVSSÁLARFRØÐI | STRATEGISKA LEIÐSLAN | VALLÆRUGREIN | VALLÆRUGREIN | ENDALIG VERKÆTLAN |
|---|---|---|---|---|---|
| 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS | 10 ECTS |

**Støði og vavi á AÚ**
Tú kanst taka seks lærugreinar uppá 3 ár og telur hetta 60 ECTS. Hetta er tað sama sum eitt ára fulltíðarlestur. Hvør lærugrein telur 10 ECTS og fevnir um 60 undirvísingartímar. Tekur tú fimm lærugreinar og endaliga verkætlan, hevur tú Akademiútbúgving.

**Upptøkutreytir**
Til at verða upptikin á Akademiútbúgvingina krevst:

1) Viðkomandi yrkisútbúgving (t.d. FHS ella SIT og lærutíð) ***ella***
2) viðkomandi grundútbúgving fyri vaksin (t.d. tikin á VUC í DK) ***ella***
3) miðnámsútbúgving ***ella***
4) aðra viðkomandi útbúgving svarandi til støði nevnt í pkt. nr. 1 – 3

***og***

5) 2 ára viðkomandi vinnulívsroyndir (onkuntíð telur lærutíðin sum vinnulívsroynd)

**Atgongd til HD 2. part**
Tað ber til at sleppa inn á HD 2. part við einum fullum akademiprógvi. Hetta er tó bert galdandi fyri breytina 'Altjóða handil og marknaðarførsla' og breytina 'Búskapur og tilfeingi'. Upptøkan er eisini treytað av ávísari lærugreinasamanseting. Meira kunning um hetta fæst á heimasíðuni: **www.glasir.fo** og
**http://bss.au.dk/efteruddannelser/hd/hd-2-del/adgangskrav-hd-2-del/**

**Ein liðilig útbúgving á akademistøði**
Akademiútbúgvingin kann lagast til títt starv, tín tørv og tíni ynskir. Tú kanst taka stakar lærugreinar ella eina heila útbúgving. Akademiútbúgvingin gevur tær førleikar, ið tú kanst brúka í tínum núverandi starvi ella til at fáa innlit í eitt nýtt arbeiðsøki.

**Møguleikar eftir Akademiútbúgving**
Eftir lokna Akademiútbúgving ber til at taka framhaldandi útbúgving á diplomstøði.

**Endalig verkætlan:**

Endalig verkætlan verður skrivað, tá allar lærugreinarnar, tær kravdu og vallærugreinarnar, eru tiknar.




**Miðnám á Kambsdali**
Dalsvegur 1
530 Fuglafjørður
Tlf: 610800
kambsdalur@kambsdalur.fo